Pizza Aage uppsagdur:

# Kallaði týskar gestir ræðuskítar

**Tað var ikki bara tolið hjá Njal R. Petersen, eigara av Pizzaria Napoli, ið var uppi, tá hann leygarkvøldið gjørdi av, at siga Pizza Aage úr starvi. Frá fólki, ið var á matstovuni, frætta vit, at fleiri av gestunum talaðu at, tá kokkurin byrjaði at kalla tveir týskar gestir ræðuskítar. Atburðurin hjá Pizza Aage hevði eisini við sær, at eitt av starvsfólkunum segði upp**



*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Hendingin fór fram á Pizza Napoli um 20 tíðina leygarkvøldið, tá tveir týskarar komu inn og bíløgdu Pizza. Tænarin, sum borðreiddi fyri teimum legði til merkis, at gestirnir tosaðu enskt, men gav sær ikki meir far um tað. Hon og øll hini starvsfólkini á Napoli hava nevniliga støðugt noktað, at verðið partur av partur av stríðnum hjá kokkinum móti týskarum og fraklendingum, og hava altíð farið líka við øllum gestunum, sum eru komnir inn á matstovuna.

Men leygarkvøldið fekk Pizza Aage also illgruna, tí tá ensktalandi gestirnir fóru upp til barrina at gjalda fyri matin, kom kokkurin út at spyrja, hvaðani teir vóru frá. Uttan at vita, hvat alt hetta snúði seg um, greiddu tey frá, at tey vóru týskarar. Hetta fekk sjálvandi øði í kokkin, sum gav sakleysu gestunum eina politiska torutalu, har hann millum annað kallaði tey ræðuskítar og gjørdi teimum greitt, at tey ikki skuldu kom inn aftur á Pizza Napoli.

## Gestir talaðu at

Rætiliga fitt av fólki var á matstovuni hetta kvøldið, og kjakið uppi við barrina fekk fleiri av hinum gestunum at reisa seg og tala at. Onkur royndi at fáa Pizza Aage at skilja, at soleiðis kundi hann also ikki bera seg at móti sakleysum fólki, sum neyvan høvdu nakra hóming av, hví tey vóru orsøkin til, at kokkurin østi seg soleiðis. Men hetta fekk ikki Pizza Aage niður á jørðina aftur. Í staðin fingu øll boð um at fara út, tí matstovan nú lukkaði, hóast matstovan vanliga ikki letur aftur fyrr enn klokkan 22 leygarkvøld.

## Segði upp

Tilburðrin leygarkvøldið var, sum vera man, sera ørkymlandi fyri øll, sum inn vóru. Ikki minst, tá Pizza Aage byrjaði at skelda tænaran, sum hevði borðreitt fyri týskarnum, fyri ikki at hava spurt teir, hvaðani teir vóru.

Sambært tænaranum, hevur starvsfólkið fleiri ferðir gjørt Pizza Aage púra greitt, at tey als ikki taka undir við hansara sjónarmiðum, og ikki undir nøkrum umstøðum vilja verða partur av hansara framferðarhátti.

– Fyri okkum starvsfólk var støðan sjálvandi ótrúliga pínlig, øll sum hon var. Men tað, sum veruliga fekk sinnið í meg, var, at Aage bleiv við at endurtaka, at »Vit« á Pizza Napoli ikki gera mat til týskarar. Hetta vildi eg ikki hava sitandi á mær, sigur tænarin, sum tískil ringdi til eigaran og gav boð um, at hon ikki kom aftur til arbeiðis, so leingi Pizza Age var kokkur á Pizzaria Napoli.

# Røtt avgerð

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík, heldur, at eigarin á Pizza Napoli tók rætta avgerð leygarkvøldið, tá hann segði Pizza Aage úr starvi.

Steinbjørn dugir ikki rættiliga at síggja, hvat býráðið kundi havt gjørt í hesum máli, annað enn at halda eitt vakið eyga við tí, sum gekk fyri seg. Og síðani næstseinasta tilburð á Napoli, hava ongir trupulleikar verið av Pizza Aage. Ikki fyrr enn leygarkvøldið.

– Sjálvandi kunnu vit læra okkurt av hesum. Men eg haldi ikki, vit skulu byrja at áseta strangar reglur út frá einum einstøkum persóni, sum í mínum eygum tykist at hava ein sera sjáldsaman atburð, sigur Steinbjørn Jacobsen, sum annars fegin vil koma við eini rættleiðing til tað, sum Njal R. Petersen segði í Útvarp Føroya í gjár um, at tað ikki høvdu verið serliga nógv ferðafólk í Norðoyggjum í ár.

– Tað er ikki rætt. Vit hava faktiskt havt óvanliga nógv ferðafólk í ár. Men tey hava kanska hildið seg burtur frá Pizza Napoli, sigur Steinbjørn Jacobsen.

# Føroyska umdømið skemmað

**Christian Olsen, leiðari á Norðoya Kunningarstovu skilur ikki, hví tað skuldi taka so drúgva tíð at fáa loyst trupulleikan við Pizza Aage. Tíverri má eg bara staðfesta, at skaðin longu er hendur, sigur Christian Olsen**

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Tá leiðarin á Norðoya Kunningarstovu fyrr í ár frætti, at Pizza Aage ætlaði at halda fram at nokta týskarum og fraklendingum mat í sínum nýggja starvi sum kokkur á Napoli í Klaksvík, bar hann skjótt at. Christian Olsen tók faldarnar frá Pizza Napoli niður av hillunum, og síðani hava teir ikki verið at sæð í Norðoya Kunningarstovu.

## Kundi havt forðað tilburðinum

Sambært Christian Olsen visti eigarin av Pizza Napoli alt um, hvør Pizza Aage var, og hvat hesin var kendur fyri bæði í Danmark og aðrastaðni, tá hann setti nýggja kokkin í starv.

Christian minnr á, at eigarin hevur havt allar møguleikar og góða tíð at forða tí, sum hendi leygarkvøldið, men gjørdi tað kortini ikki. At atburðurin hjá Pizza Aage skuldi ganga út yvir gestir og starvsfólk, áðrenn tann, sum veruliga hevði ábyrgdina, traðkaði til, var sambært Christian bæði óneyðugt og púra órímiligt.

## Skaðin longu hendur

Eg eri sjálvsagt glaður um, at Pizza Aage er farin aftur til Danmarkar, men eg má samstundis tíverri viðganga, at eg vænti, at skaðin longu er hendur. Tað skuldi ikki undra meg, um hesi tíðindini verða at frætta aðrastaðni líka skjótt, sum hinar ferðirnar, Pizza Aage hevur gjørt um seg, sigur Christian Olsen, sum nú fer at leggja faldarnar frá Pizza Napoli framaftur.

Beint áðrenn blaðið fór til prentingar frættist, at tilburðurin á Napoli leygarkvøldið var ein av høvuðssøgunum í tíðindasendingini hjá DR í gjárkvøldið.



Føroya Fiskimannafelag:

# Undirbyggja klaguna til TV2

**Føroya Fiskimannafelag hevur nú sent eina undirbygging av klaguni, sum send varð til TV2 í seinastu viku**

KLAGA
*Ingrid Bjarnastein*
*ingrid@sosialurin.fo*



*TV2 hevur nú fingið eina undirbygging av klaguni, sum Føroya Fiskimannafelag sendi til teirra í seinastu viku*

Innslagið, sum TV2 sendi í farnu viku, um føroyskar fiskimenn, fekk Føroya Fiskimannafelag at ressast úr stólinum.

Sjónvarpsrásin vildi nevniliga vera við, at føroyskir fiskimenn høvdu lív og góðar dagar orsakað av serligu skattaskipanini og blokkinum. TV2 segði í innslagnum, at føroyskir fiskimenn høvdu eina ársinntøku uppá 664.000 krónur eftir skatt.

Føroya Fiskimannafelag vildi ikki hava slíkar pástandir hangandi í luftini, sum sambært felagnum ikki eru rættir. Og tí varð ein klaga skrivað til donsku sjónvarpsrásina, har Fiskimannafelagið klagar yvir skeivu upplýsingarnar, ið koma fram í innslagnum.

Klagan varð send 20. juli, og hevur sjónvarpsrásin síðani kravt at fáa undirbygt klaguna. Hetta hevur Fiskimannafelagið gjørt, og undirbygging av klaguni varð send TV2 í gjár, mánadag.



*Óli Jacobsen, formaður í Føroya Fiskimannafelag, hevur nú skrivað eina undirbygginav av klaguni, felagið sendi til donsku sjónvarpsrásina TV2 í seinastu viku*

## Manipulerað

Fiskimannafelagið sigur í undirbyggingini av klaguni millum annað, at innslagið hjá TV2 er bæði skeivt og manipulerandi.

– Føroyskir fiskimenn kenna seg sum syndabukkar, sjálvt um tað eru teir, sum standa fyri føroysku útflutningsinntøkunum, og tað er teirra úrslitum, vælferðin í samfelagnum avhongur av, sigur Fiskimannafelagið við TV2.

Felagið sigur, at veruleikin fyri inntøkurnar hjá fiskimonnum er ein heilt annar, enn tað TV2 vil vera við.

– Um vit taka teir ymsu bólkarnar av »stórum bátum« í 2003, gevir hetta eina ársløn uppá 440.000 krónur áðrenn skatt. Um síðani verður roknað við, eins og TV2 hevur gjørt, einum skattaprosenti á 35%, verður tað til 286.000 krónir eftir skatt. Hetta skal samanberast við tær 664.000 krónurnar hjá TV2, sigur Fiskimannafelagið við sjónvarpsrásina.

– Um ein síðani tekur miðaltalið fyri fleiri ár, verður tað øðrvísi, men ikki so nógv, at henda myndin broytist.

## 7% nótaskip

Í bólkinum undir teimum »stóru bátunum« eru eisini nótaskip. Tey telja tilsamans umleið 7% av hesum bólki.

– Tey sjey prosentini fyri tað besta árið nakrantíð verða brúkt sum tøl fyri miðallønina hjá føroyskum fiskimonnunum. Lønin hjá hinum prosentunum, har inntøkan vanligt er helvtin hjá nótaskipunum, verður ikki brúkt, verður sagt.

Ábyrgdarhavandi fyri tíðindunum hevur sagt, at uppgivnu tølini eru bert frá nótaskipum.

– Men hon hevur ikki hildið tað hava týdning, at vísa á hetta. Tað kann skjótt vera munurin millum sannleika og lygn, og soleiðis er tað í hesum førinum, sigur Fiskimannafelagið.

## Nýggj hagtøl

Við Útvarpið segði TV2, at tey høvdu fingið at vita frá Fiskimannafelagnum, at tað vóru ikki nøkur endalig hagtøl fyri inntøkurnar hjá fiskimonnum í 2003, og víst varð tí til heimasíðuna, har tey nýggjastu tølini stava frá 2001.

– Hetta er ikki satt, og tað kann prógvast. Vit hava ógvuliga væl dagførd hagtøl – tey bestu á økinum. Tí kunnu vit longu við árslok geva fyribils hagtøl fyri árið, og endaligu hagtølini eru klár longu eftir einum mánaði.

Fiskimannafelagið vísir eisini á, at heimasíðan hjá felagnum bert er at finna á føroyskum.

– Um eitt danskt tíðindafólk kann dekka eina síðu av einum máli við at koma inn á eina heimasíðu, hvørs mál viðkomandi ikki skilir, má ein rokna við er ómøguligt.

Fiskimannafelagið endar klaguna við at siga, at felagið tekur málið í størsta álvara. Tí er tað teirra krav og væntan, at boðskapurin innslagnum verður rættaður, og víst verður til pressuetisku reglurnar.

# Olav og Tommy vendu aftur til Noregs

**Teir báðir norðmenninir, Olav Lie Gundersen og Tommy Skeide, sum vóru á veg til Føroya í árabátinum »Barbaru«, vendu leygardagin aftur til Noregs og hava avlýst ferðina**

FØROYAFERÐ
*Eirikur Lindenskov*



*Føroyaferðin hjá Olav Lie Gundersen og Tommy Skeide endaði einar 180 fjórðingar úr Føroyum*

Ætlanin hjá Olav Lie Gundersen og Tommy Skeide var, at teir skuldu rógva á Havnina beint eftir kappróðurin ólavsøkudag. Leygardagin frættist av feltinum, at teir vendu aftur til Noregs. Teir vóru tá staddir 180 fjórðingar úr Føroyum á 63°N og 011°V. Teimum vantaði vatn og vindur øktist.

Teir høvdu tá verið umborð á danska trolaranum, Gitte Henning, har fleiri føroyingar eru við, og vaskað sær og fingu eta og vatn. Teir settu síðani segl og hildu leiðina til Noregs - men eitt norskt vaktarskip fór út ímóti teimum og tók teir við til lands seint leygarkvøldið.

# G! Festival 2004

**Føroya største og feitasta tónleikatiltak. Tað eydnaðist saman við tykkum mongu, sum leitaðu tykkum á G! Festival seinasta vikuskiftið. Tykkum takka vit stórliga og vónandi síggjast vit aftur næsta ár**

**Tíðindaskriv**
*G! fyrireikararnir*

Orðið takk er bert eitt orð, men við størsta týdningi og allari rúmd í hjartanum, verður tað nýtt her.

Høvusðstuðlarnir Nordisk Kulturfond, Götu Kommuna, Mentamálaráðið, Konto In, Dimmalætting og Atlantic Airways, takk fyri stuðulin vit ikki kundu verið fyri uttan. Takk allir aðrir stuðlar, tit vóru við til at gera hetta gjørligt.

Øll hjálparfólk, á ein ella annan hátt, takk fyri. Vit vóna at tit eru eins errin og glað sum vit. Tit eiga æruna fyri at hetta kundi fremjast í verki.

Tøkk til Gøtufólk, at tit taka so væl ímóti G!, øll tit, ið fluttu úr húsum tykkara, til tess at gestandi tónleikarar kundu kenna seg heima. Teir eru allir ovfarnir av tykkara gestablídni.

Takk til løgregluna og samarittarnar fyri gott arbeiði.

Øll, ið á ein ella annan hátt vóru við til at skapa tiltakið og fáa tað av bakkastokki.

Takk til tónleikararnar, ið góvu áhoyrarunum so ríkar lötur.

Takk Gud fyri tónleikin, at tiltakið spældi væl av og fyri gott veður.